# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tøkk

Takk fyri sýnda samkenslu, tá góða mamma, omma og langomma okkara

**Anna Paulina Brattaberg**

andaðist og fór til gravar.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til heilafelagið.
Tøkk fáa heimahjálpirnar og sjúkrasystrarnar eins og Eldrabýlið fyri tíðina, hon var har.
Tøkk til Suðuroyar sjúkrahús fyri góða hjálp.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, organist og sangarar
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu.

**Børnini**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okkara elskaða kona, mamma, vermóðir og omma

**Jana Vinnersted**
úr Slagslunde,
ættað av Sandi

andaðist og varð jarðað.

**Teddy**
**Mik og Gitte við familiu**
**Stina og Johann við familiu**

**Brúdleyp**
Maibrit og John Marni Forná giftast leygardagin 27. september í Keypmannahavn. Adressan er: Lergravsvej 52, 1. t.v., 2300 København S.

**90 ára føðingardagur**
Týsdagin 23. september fyllir Anna Jacobsen, Hoyvíksvegur 31, Tórshavn 90 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 20. sept frá kl. 10-16. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Mikudagin 24. september fyllir Poli Jacobsen, Miðvágur, 90 ár. Dagurin verður hildin á Ellisheiminum á Sýnini frá kl. 16-19.

**80 ára føðingardagur**
Týsdagin 23. september fyllir Jóan Pauli Johannesen, vanliga nevndur Palli í Jákupsstovu, Vestmanna, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin ið Miðhøllini í Vestmanna skúla sunnudagin 21. september frá kl. 16-20.

**70 ára føðingardagur**
Mikudagin 24. september fyllur Jógvan Elis Danielsen, kokkur, Alfehøjvej 66, 4684 Holmegård (við Næstved) 70 ár.

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 25.oktober verður Thordis Skaalum, Sørvágur 60 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Miðvági 25. oktober kl. 19.00. Tey, ið vilja verða við til at gleða meg og gera dagin hugnaligan, vinarliga ringi til tlf. 333119 ella 227216 í seinasta lagi 10. oktober. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**50 og 55 ár**
Leygardagin 11. oktober kl. 19.00 halda Hervør og Dánial Jákup Jørgensen úr Miðvági 50 og 55 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Miðvági. Tey, ið vilja gleða okkum okkum við at koma, verða biðin um at siga frá innan 27. september á telefon 33 32 04 og 22 96 04 ella á telduposti: herdan@post.olivant.fo

# Nýggj føroysk frímerki




Mánadagin 22. september gevur Postverk Føroya út nýggj frímerki
- eitt smáark við tíggju frímerkjum, sum ímynda trøllakampar og tvey frímerki, ið avmynda gamlar krossar.

Arkið við trøllakampum hevur Edward Fuglø teknað, meðan hini bæði frímerkini hevur Anker Eli Petersen lagt til rættis.

Virðiniá frímerkjunum eru 6,00, 8,00 og 10,00 kr, hetta tí at postgjøldini verða broytt tann 9. oktober 2008.




**Dagurin**
**23. september. Linus**, deyður í árinum 79. Var fyrsti eftirmaður Pæturs á pávastóli í Róm. Halgisøgur siga, at hetta er tann Linus, sum nevndur er í 2. Tim. 4, 21, men tað vita teir ikki við vissu. Dagurin eitur eisini heystjavndøgur.

# Nýggj føroysk sjónvarpsrás

**IKTUS er heitið á nýggjari føroyskari sjónvarpsrás, sum fer at senda fyrsta dagin á nýggjum talgiltum sendineti**

Kunnandi fundur verður fyri øll áhugað í Kelduni í Skálafirði leygardagin 27. september kl. 16-17.

Á fundinum verður ein stuttur filmur sýndur á stórskíggja, sum kunnar um nýggju rásina, og vísir brot úr ymiskum sendingum. Greitt verður síðan frá endamáli, ætlan og møguleikum við IKTUS, sum eitt tvørkirkjuligt forum, har allar evangeliskar kirkjur og samkomur kunnu luttaka í sendingum. Umboð frá áhugaðum kirkjum og samkomum kunnu eftir fundin skipa seg í arbeiðsbólkar umboðandi ymisk økir í landinum, sum hava til endamáls at lata tilfar til nýggju rásina.

Aftaná fundin verður høvi at seta spurningar, at síggja upptøkutól, ein upptøkubuss og at fáa sær ein




kaffimunn.

IKTUS, kristiligt sjónvarp, varð stovnað í mai 2008, og nakað seinni sást búmerki, sum er ein fiskur, á skerminum hjá teimum, sum leitaðu sær rásina fram. Nakrar royndarsendingar hava verið, t.d. frá Fjarðafestivalinum 2008, har sent varð beinleiðis allar tríggjar dagarnar á talgiltu rásini IKTUS og samsent á Rás 1 hjá Televarpinum. Í løtuni arbeiða uml. 5 fólk við ymiskum fyrireikingum, t.d. við at byggja upptøku- og sendistudio, at gera upptøkur, klippa og annars at leggja alt til rættis.

Ætlanin er at byrja nakrar regluligar sendingar í oktober, og so við og við at víðka um senditíðina, í takt við at kirkjur, samkomur og onnur áhugað byrja at lata meira tilfar og luttaka í beinleiðis sendingum.

IKTUS sæst, sum er, í miðstaðarøkinum og á Skálafjørðinum á sendinetinum hjá R2Net - á 578 Mhz (kanal 34) - frá Nólsoynni, og um stutta tíð verður sendinetið víðkað við sendarum á Gøtueiði og Brúnaskarði, og síðan á t.d. Oyrnafjalli í Suðuroynni.

Tað eru í hvussu er fýra hættir at síggja rásina IKTUS. Tann fyrsti er við einum sjónvarpi, sum hevur DVB-T móttakara innbygdan, tað hava fleiri nýggj flatsjónvørp. Tann næsti hátturin er við einum leysum DVB-T móttakara, t.d. Televarpsmóttara. Tann triði er við einum hardiskupptakara við innbygdum DVB-T móttakara og til seinast við einari farteldu við innbygdum DVB-T ella leysum DVB-T USB stikki. Allir háttirnir hava sjálvandi brúk fyri eini UHF antennu, sum t.d. Televarpshyggjarar longu hava.

IKTUS er ein sokallað free-to-air rás, t.v.s. hon krevur einki kort, er ókeypis at síggja, og verður fíggjað við stuðlum og gávum.

Fyrireikararnir vóna at síggja nógv fólk til fundin, sum verður komandi leygardag, annars fæst meira at vita á heimasíðuni: www.iktus.fo